

# FØROYA STØRSTA HOTEL SØKIR NÝGGJAN LEIÐARA

Smyril Line søknast eftir einum Hotel Manager umborð á Norrönu. Sum Hotel Manager hevur tú dagligu leiðsluna av hoteldeildini, sum umfatar:

- 3 matstovur
- 2 náttklubbar og undirhald til børn og vaksin
- Taxfree handilin, móttøkuna og reingerðardeildina

Saman við leiðsluni á landi og umborð, skalt tú syrgja fyri, at okkara ferðafólk altíð fáa tað bestu og tryggastu tænastuna, tá ið tey velja at ferðast við Norrönu.

Starvið, sum Hotel Manager, er bæði spennandi og avbjóðandi, og tú hevur til uppgávu at leiða upp til 90 starvsfólk og tryggja, at tey upp til 1500 ferðafólkini fáa ein ógloymandi túr við største skipinum í føroyska flotanum.

**Vit leggja dent á, at hetta passar til tín persón:**

- Loyal/ur
- Góð leiðsluevni
- Góð samstarvsevni
- Tekur væl ímóti avbjóðingum
- Ynskir bæði fakliga og persónliga menning

Tú ynskir at skapa framburð og menning. Við tínum royndum innan starvsøki, veist tú hvat krevst fyri, at hotelli skal verða í støðugari menning. Vit seta dagliga trivnaðin sera høgt, og vænta vit av tær, at tú dugir at leiða og stuðla tínum samstarvsfelagum. Tú fært ábyrgd av ætlanum og starvsfólkum og verður ímyndin av einum góðum arbeiðsumhvørvi. Sum Hotel Manager fært tú nógva ábyrgd, men samstundis eisini frælsi at leiða og at taka tær neyðugu avgerðirnar.

**Førleikakrøv:**

- Viðkomandi útbúgving innan tænastuvinnuna
- Royndir frá líknandi starvi
- Leiðsluroyndir
- Góðan telduførleika (Office-pakkin)
- Dugir at skipa arbeiði
- Skandinaviskt og enskt í talu og skrift
- Kunnleiki til OSCAR ella líknandi kassa- og goymsluskipan
- Heilsuprógv fyri sjófólk

Ynskir tú at vita meira um starvið, ber til at ringja á +298 34 59 00 og spyrja eftir Róa Kalsø.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum.

Umsóknarfreist: **11. apríl 2008.**

Skrivligar umsóknir við lívsrensli og prógvum, skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
P.O.Box 370
FO-110 Tórshavn
Att.: Rói Kalsø

ella

roik@smyril-line.fo
mrk. HOTEL MANAGER

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umfram egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

# HANDILS- & RØRSMIÐJU LÆRLINGAR

Vit sóknast eftir einum handilslærlingi og einum rørsmiðjulærlingi til høvuðsdeild okkara í Havn skjótast gjørligt…



TÓRSHAVN

**Vit bjóða tær**
eitt áhugavert og spennandi lærupláss við nógvum avbjóðingum, har vit raðfesta tænastu, góðsku og gott handverk í tí, vit gera.

Tú verður partur av vælvirkandi virki okkara við nógvum góðum og dugnaligum starvsfólkum.

Sum lærlingur á høvuðsdeild okkara í Havn fært tú góðar arbeiðsumstøður og kemur at arbeiða sjálvstøðugt og soleiðis geva títt íkast til virksemi okkara.

**Vit vænta,**
at tú ert nærlagdur, ágrýtin og røkin og setir avíkavist kundatænastu og gott handverk í fremstu røð. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi felag.

Fyrispurningar rørsmiðjulærlingur:
Torbjørn Hansen á torbjorn@demich.fo ella tel 30 93 10.

Fyrispurningar handilslærlingur:
Heini Joensen á heini@demich.fo ella tel 30 93 10.



Demich
Stiðjagøta 2
Postboks 378
110 Tórshavn

tel +298 30 93 10
fax +298 30 93 11
demich@demich.fo
www.demich.fo

demich



# HANDILSLEIÐARI TIL NORRÖNU

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi starv sum handilsleiðari í einum altjóða umhvørvi har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Tú ynskir at skapa úrslit og hevur góð samstarvsevni. Við tínum royndum innan starvsøki, veist tú hvat krevst, fyri at handilin skal verða í støðugari menning. Vit seta dagliga trivnaðin sera høgt, og vanta vit av tær, at tú dugir at leiða og stuðla tínum samstarvsfelagum. Tú fært ábyrgd av ætlanum og starvsfólkum, og verður ímyndin av einum góðum arbeiðsumhvørvi. Sum handilsleiðari fært tú nógva ábyrgd, men samstundis eisini frælsi at viðgera dagligu avbjóðingarnar.

Frøleikakrøv:

- Viðkomandi útbúgving, t.d. økonomi og handil
- Royndir í líknandi starvi (handilsleiðari, handilsleiðarahjálpari)
- Leiðsluroyndir
- Góðan telduførleika (Office-pakkin)
- Dugir at arbeiða strukturerað
- Skandinaviskt og enskt í talu og skrift
- Kunnleiki til OSCAR ella líknandi kassa- og goymsluskipan

Vit vilja heita á bæði kvinnur og menn at søkja starvið.

Ynskir tú at fáa meira at vita, vitja www.smyril-line.com ella ring +298 34 59 00 og spyr eftir Róa Kalsø, hotelstjóra.

Umsóknarfreist: **23. apríl 2008**

Skrivligar umsóknir við CV, skulu sendast til:
crew@smyril-line.fo,
mrk. SHOP SUPERVISOR

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM